# Fleiri stormskaðar í Fuglafirði



*Sløkkiliðið í Fuglafirði var í fleiri førum úti og smíðaði fyri stormskaðar í gjárkvøldið*

*Mynd: Johann Clementsen*

Leo Poulsen

Vindurin var so nógvur sum sjáldan áður í Fuglafirði í gjárkvøldið, og fleiri stormskaðar vóru.

Tað byrjaði um knapt átta tíðina í gjárkvøldið, tá tveir rútar á flakavirkinum fóru. Sløkkiliðið fór á staðið og negldi plátur fyri.

- Stutt eftir máttu vit so á gamla Ice, sum eisini hevði fingið stormskaða, og tað fingu vit so bøtt upp á eisini, sigur Johann Clementsen, sum er sløkkiliðsleiðari í Fuglafirði.

Seinni upp á kvøldið fekk eisini frystigoymslan á havnarøkinum stóran skaða, tá ein heilur veggur feyk í havið. Sløkkiliðið fekk lagt trol oman yvir.

- Vit vóru lidnir um miðnáttina, og tað er einki hent síðani, hvørki í nátt ella í morgun, sigur Johann Clementsen.

# Føroyskur flokkur á donskum skúla

## 19 føroyskar kvinnur hava við fjarlestri á donskum skúla útbúgvið seg til baccelorar í pedegogikki. Árgangurin á skúlanum hevði besti úrslit nakrantíð

Randi Jacobsen

Ikki øll, sum søkja inn á pedagogútbúgvingina í Føroyum, sleppa inn. Haraftrat er tað møtimikið hjá teimum, sum hava børn og ikki búgva í Havn, at skula ferðast aftur og fram hvønn dag millum heim og skúla.

Hetta var orsøkin til, at Hervør Nolsøe í Klaksvík valdi at søkja inn á ein danskan skúla og lesa á netinum.

Tað vóru fleiri smærri pedagogskúlar á Norðursælandi, og Hervør byrjaði á einum teirra. Síðan eru teir allir lagdir saman til "Pedagoguddannelsen Nordsjælland", haðani tær 19 nú hava fingið prógv.

Útbúgvingin tekur trý ár. Tey, sum ikki hava royndir, skulu tríggjar ferðir í starvsvenjing, men hesar 19 fóru bara eina ferð í praktikk, tí tær høvdu allar royndir. Nakrar føroyskar aftrat í sama flokki fáa prógv um eitt hálvt ár, tí tær høvdu ikki royndirnar.

### Gott og strævið

Hervør er fegin um at vera komin á mál. Tað var ein góður skúli og ein avbera góður flokkur, men tað hevur verið sera strævið, tí hon arbeiddi fulla tíð tað mesta av tíðini, meðan hon las.

- Men tað var tað vert, sigur hon.

Tað mesta av undirvísingini fór fram á netinum, har flokkurin hevði sína egnu skúlastovu.

Nakrar ferðir ahav tær verið á skúlanum og fingið undirvísing, og fleiri ferðir hava tveir lærarar veri í Føroyum og undirvíst í tveir dagar á rað hvørja ferð. Henda undirvísingin fór fram við Gjógv.

Hervør viðgongur, at tað var hart at arbeiða, samstundis sum hon las. Hinvegin var tað ein fyrimunur at kunna royna nýggja kunnleikan beinanvegin. Tað seinasta hálva árið hevði hon ikki orku til at arbeiða eisini.

### Kostar

Tað er ein fyritøka at fara undir slíka útbúgving, tí skúlin kostar nógv, bøkurnar tað sama, og ferðaútreiðslurnar og útreiðslurnar við at vera í Danmark ella eitt vikuskifti við Gjógv eru ikki smáar. Stuðul var eingin.

Elsti næmingurin í flokkinum hjá Hervør var 55 ára gomul, og bara onkur hendinga næmingurin var bladung.

- Tær flestu vóru í 30-árunum og høvdu børn, og vit fóru allar miðvíst í útbúgvingina. Tað mundi vera tí, at úrslitini vóru so góð, sigur Hervør.

Uppi í tí hongur eisini, at fólk, sum brúka so nógvan pening til eina útbúgving, tveita ikki peningin burtur við at gevast.

28. januar vardi Hervør baccelor-uppgávu sína og fekk prógv.

Enn hevur hon ikki fingið nakað starv. Men tað verður neyvan nakar trupulleiki, heldur hon.



*Allar vóru í føroysku klæðum, tá ið tær í Danmark fingu prógvini handað.*
*Aftast frá vinstru: Ester (lærari) Mia Samuelsen, Klaksvík - Rakul N í Lágabø, Vágur - Hildur L Jákupsdóttir, Leirvík - Halgerð Jacobsen, Tórshavn - Miriann Poulsen, Nólsoy*
*Í miðjuni: Doris Olsen, Velbastaður - Eyðhild Mørk, Vágur - Sólva Valle, Tórshavn - Hervør Nolsøe, Klaksvík - Anna Jørmundsson, Fuglafjørður - Arnleyð Hjelm, Vágur - Hansina Clementsen, Tórshavn - Maja Joensen, Viðareiði.*
*Sitandi fremst: Helena Hergeirsdóttir, Vágur - Helin Rasmussen, Hósvík - Ruth Jacobsen, Klaksvík - Elsa L. Leo, Leirvík - Anja Clementsen, Klaksvík - Sólgerð Joensen, Klaksvík.*